## Altingið summarfrí

Íslendska Altingið fór í summarfrí í gjár, og hendir einki óvæntað, kemur tingið ikki saman aftur fyrr enn tann 1. oktober. Morgunblaðið skrivar, at tingsetan bleiv heldur drúgv hesaferð orsakað av altingsvalinum og stjórnarskiftinum herfyri. Nú Altingið fóri summarfrí, boðaði nýggi formaðurin, Sturla Böðvarsson, frá, at hann ætlar sær at fremja ymsar broytingar í arbeiðslagnum hjá tinginum í samráð við stjórnina og flokkarnar.



## Skulu bjarga toskinum

Í ES hava fiskimálaráðharrarnir samtykt at skerja fiskidagatalið hjá teimum, sum fiska tosk í Eystrasalti, 10 prosent um árið, til toskastovnurin er komin so frægt fyri seg, at hann er burðardyggur. Tað merkir tó ikki, at toskakvotan verður skerd. Saman við samtyktini um at bjarga stovninum hava ráðharrarnir lagt eina ætlan um, hvussu myndugleikarnir skulu steðga ólógligum fiskiskapi, sum ikki verður skrásettur nakrastaðni.

# Okkum vantar fólk hvønn dag

**- Støðan er álvarsom. Vit fáa ikki ment okkum, sum vit áttu at gjørt, tí torført er at uppdríva fólk, bæði handverkarar og fólk í dagliga arbeiðinum. Okkum vantar arbeiðsfólk hvønn einasta dag, sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS**

ARBEIÐSMEGI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



- Tað er ikki bara í høvuðsvinnuni, at stórur tørvur er á arbeiðsmegi. Hetta er galdandi innan flestu vinnur í Føroyum og kring meginpartin av landinum. Serliga ringt er í høvuðsstaðnum, eisini innan handils-og tænastuvinnuna.

Niels Mortensen, stjóri, rópar varskó.

- Støðan er álvarsom. Hon hemmar okkum í teirri menning, sum vit vilja hava skal vera í okkara virksemi.

Hann vísir á, at næstan ómøguligt er at uppdríva handverkarar.

- Okkum vantar fólk hvønn einasta dag, og eg veit, at aðrir eru í somu støðu.

Niels sigur, at tað sum heild eisini er ógvuliga torført at finna fólk til handils- og tænastuvinnuna.

- Tað er soleiðis ikki bara í fiskavirkisvinnuni, at tørvur er á fólki. Eg meti, at handils-og tænastuvinnan saktans kundi havt eini 80 fólk aftrat.

### Steðgar menning

Stjórin er avgjørdur, tá hann

*- Eg haldi, at okkara arbeiðsmarknaður er alt ov lukkaður. Ein føroyingur kann arbeiða í Týsklandi, men ein týskari kann ikki arbeiða í Føroyum uttan alt møguligt – og ómøguligt – hóvasták, sigur Niels Mortensen, stjóri*

sigur, at støðan á arbeiðsmarknaðinum tarnar virkseminum hjá Fastognarfelagnum í síni menningarætlan.

- Myndugleikarnir kunnu ikki framhaldandi sita hendur í favn og tosa og aftur tosa. Fólk, sum sita við ábyrgd, mugu taka seg saman. Tað verður bara tosað, men einki hendir.

Niels dylur ikki, at hann hugsar um, at útlendingar kundu havt lættari atgongd til okkara arbeiðsmarknað.

- Eg haldi, at okkara arbeiðsmarknaður er alt ov lukkaður. Ein føroyingur kann arbeiða í Týsklandi, men ein týskari kann ikki arbeiða í Føroyum uttan alt møguligt – og ómøguligt – hóvasták, sigur stjórin.

### Lítið samfelag

- Eg veit, vit liva í einum lítlum og viðbreknum samfelag, og tí skilji eg væl, at vit einki gera í óðum verkum. Alt má vera undir væl skipaðum viðurskiftum.

Men, sigur Niels:

- Vit kunnu heldur ikki bara sita hendur í favn, meðan øll menning heldur uppat.

Hann sigur, at Fastognarfelagið hevur ikki somu møguleikar til menning í dag sum bara fyri einum ári síðan.

- Vit hava sæð, at OECD hevur vist á, at Danmark verður tarnað í sínari menning orsakað av vantandi arbeiðsmegi, sum er vorðin ein rættiligur fløskuhálsur. Hetta heldur vøkstrinum í landinum aftur. Støðan í Føroyum er munandi verri enn í Danmark.

### Forkastilig støða

Niels Mortensen tekur so rívan til og sigur, at støðan við okkara arbeiðsmarknaðarviðurskiftum og teimum útlendingum, sum eru í Føroyum, er forkastilig.

- Eg haldi ikki, at okkara samfelag behandlar hesi fólk væl, sigur stjórin.

# SMS tekur nú vesturbýin

**Hugsandi er, at ognin, sum Ludvík Petersen hevur átt í Smiðjugerði í Havn, um ikki so langa tíð verður bakarí, nú P/F Fastognarfelagið hevur keypt**

SØLA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Fastognarfelagið, sum stendur aftanfyri SMS í Havn, hevur keypt ognina, har Ludvík Petersen áður hevði bilasølu og verkstað í Smiðjugerði 4 í Havn.

Seljari er Sp/f Slp við Ludvík Petersen.

Bæði seljari og keypari vátta søluna, men hvørgin vil upplýsa søluprísin.

### Hansdilsvirksemi

Niels Mortensen, stjóri, sigur, at felagið helst fer at lata upp handil í Smiðjugerði. Gólvvíddin á ognini er stívliga 1000 fermetrar, og grundøkið er 2500 fermetrar.

- Enn hava vit ikki endaliga gjørt av, hvat slag av handilsvirksemi talan verður um, men óhugsandi er ikki, at ognin í fyrsta lagi verður karmur um bakarí.

Hann vísir á, at ógvuliga torført er at fáa handverkar og fólk til arbeiðis annars, tí virksemið í landinum er so stórt.

- Tað gongur ógvuliga illa at uppdríva handverkarar. So, vit kunnu bara taka ein dag í senn. Vit vita ikki, nær vit sleppa í gongd við tí, sum skal gerast í Smiðjugerði.

### Góð plasering

Niels Mortensen sigur, at felagið keypti ognina í Smiðjugerði, tí hon hevur eina góða plastering við Ringvegin.

- Vit halda, at hetta er ein av bestu plaseringum í hesum partinum av býnum – eisini við teimum møguleikum, sum liggja fyri framman, sigur stjórin.

Hann væntar, at felagið fer at geva sær hampiliga góðar stundir at hyggja uppá hesa nýggju verkætlan.

- Tað kann koma at taka sína tíð, men tað kann eisini ganga skjótt, um viðurskiftini broytast, sigur Niels Mortensen, stjóri.



*- Vit halda, at hetta er ein av bestu plaseringum í hesum partinum av býnum – eisini við teimum møguleikum, sum liggja fyri framman, sigur stjórin, Niels Mortensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*